# Heimarøktin Sandoyar Øki

**søkir eftir sjúkrarøktarfrøðingi til barnsburðarfarloyvi og eftir heilsurøktarum í føst størv**

Søkt verður eftir einum barnsburðaravloysara fyri sjúkrarøktarfrøðingi á setanarbrøki 0,7 í tíðarskeiðnum 1. januar 2006 til 30. september 2006 og trimum heilsurøktarum í føst størv á setanarbrøki 0,7.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði.

Heimarøktin Sandoyar Øki er ein skipan, har heimarøkt, røktarheims- og sambýlisrøkt er samskipað, og har starvast verður á øllum eindum.

**Vit søkja eftir fólki:**
- við røktarfakligum royndum
- sum hevur hug og hegni at samstarva við ymiskar fakbólkar
- sum hevur hug og hegni at undirvísa og vegleiða starvsfelagar, lesandi og næmingar
- sum hevur hug at starvast bæði inni á bústovnum og úti í heimarøktini.

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt spennandi og mennandi starv, har arbeitt verður tvørfakligt
- eitt starv við skiftandi avbjóðingum
- eitt starv í einum øki, sum er í støðugari menning.

Størvini eru lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til økisleiðaran á tlf. 361749 ella 213890.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av autorisatión, prógvi og møguligum viðmælum v.m. skal sendast til:

**Heimarøktin Sandoyar Øki**
Áargarður
210 Sandur

**Umsóknarfreist:** 21. desember 2005.

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

# Lærarar til timbur- og snikkaradeildina

Eitt starv, sum er fulltíðarstarv. Hitt starvið er tíðaravmarkað fulltíðarstarv í 1 ár. Størvini umfata undirvísing á timbur- og snikkaradeildini.

Umsøkjarar skulu hava sveinabræv sum bygningssnikkari ella húsasmiður, og viðkomandi starvsroyndir innan yrkið.

*Deildin undirvísir næmingum, sum læra til húsasmið, bygningssnikkara ella eru SIT-næmingar. À deildini starvast 7 faklærarar, umframt lærarar í almennum lærugreinum 1 verkvørður.*

**Løn:**
Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

Starvið skal setast 9. januar 2006.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir og viðmælum skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 15. desember 2005.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlan, tlf. 30 80 50.

**TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN**
Marknagilsvegur 75 · Postsmoga 3239
FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 308050 · Fax +298 308051
e-mail: tst@tst.fo

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

# Lærari til byggitøkningadeildina

Starvið, sum er eitt fulltíðarstarv, umfatar í høvuðsheitum undirvísing av byggitøkningum, og kann eisini umfata aðra undirvísing á skúlanum.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum bygningssnikkari ella húsasmiður, hava byggifrøðingaútbúgving og viðkomandi starvsroyndir innan økið. Umsøkjarin skal hava undirvíst á hægri lærustovni.

**Løn:**
Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

Starvið skal setast 16. januar 2006.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir og viðmælum skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 16. desember 2005.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlan, tlf. 308050.

**TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN**
Marknagilsvegur 75 · Postsmoga 3239
FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 308050 · Fax +298 308051
e-mail: tst@tst.fo

# Saltspreiðarar og saltkassar





**Kaj Andreasen & Co**
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00

Sosialurin 341800

# Musikkskúlaskipanin

søkir avloysara/ar fyri musikklærara í farloyvi frá 3. januar til 12. februar 2006, at:

- undirvísa í blokkfloytu, klarinett og saxofon á Oyrarbakka týsdagar
- í blokkfloytu og klarinett í Hósvík hósdagar
- saxofon og fagott í Tórshavn mánadagar og mikudagar.

Lokið prógv frá musikkonservatorium krevst. Onnur kunnu tó søkja.

Setanar- og lønarviðurskifti sambært sáttmála millum Musikklærarafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Meira - um tíðir og støð - fæst at vita hjá leiðaranum Martin Mouritsen á tlf. 216462.

**Musikkskúlaskipanin**
Hoyvíksvegur 72
FO-100 Tórshavn · Tlf. 316462
Teldupostur: martin@mmr.fo
www.musikkskulin.fo

**HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?**

22 50 00
TÍÐINDAVAKTIN
ALT VIKUSKIFTIÐ

VIVA



Vikuskiftisvaktin hjá
**SOSIALINUM & PORTALINUM**
er at hitta alt vikuskiftið á
**TELEFON 22 50 00**
Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum

VIVA